B36-Skála 6-0 (4-0):

# B36 nærkast

**Eitt vælleikandi B36 lið tók sær av løttum í Gundadali sunnudagin, tá botnliðið Skála var á vitjan. Ongantíð var nakar ivi um, at havnarliðið fór at vinna dystin, og nú nærkast B36 oddinum**

B36-SKÁLA
*Heini í Skorini*



*Myndin lýgur, tí Bárður Mortansson og B36 vóru greitt við yvirlutan móti Arnold Berg og Skála í Gundadali sunnudagin. Við sigrinum nærkast B36 spakuliga toppinum í føroysku 1. deild*

Hóast B36 var stórfavorittur undan dystinum móti Skála í Gundadali sunnudagin, spøkti 1-1 javnleikurin millum somu liðini fyrr í ár í bakhøvdinum á mongum óróligum B36 viðhaldsfólkum.

Men hesaferð var søgan øðrvísi, og B36 sat á dystinum frá byrjan til enda. Eftir hálvleiksstøðuna 4-0 vísti máltalvan 6-0, tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð, og tískil var talan um ein sannførandi sigur, sum í roynd og veru var ein avgreiðsluspurningur hjá B36.

### B36 avgjørdi tíðliga

Bert fimm minuttir vóru farnir av dystinum, tá B36 fekk fyrsta málið. Bárður Mortansson, sum var sera vælleikandi í høgra borði, legði B36 á odda eftir trunkaspæl, og hóast dysturin bert var fimm minuttir gamal, lá ein stórsigur í luftini.

Næstu løtuna gekk báðar vegir, og var hetta besta periodan hjá Skála í dystinum. Bæði B36 og Skála høvdu naskar roymdir á málið, og B36 verjuleikarin Arnbjørn Danielsen noyddist enntá at bjarga á strikuni eftir eitt Skála álop. Í 22. minutti var B36 aftur uppá spæl, og hetta málið var kanska mønustingurin hjá Skála. Eftir eina góða fríspæling gjørdist skálamaðurin í B36, John Petersen, púra leysur við málverjanum, og uttan trupulleikar legði hann B36 á odda 2-0.

### Einvegis ferðsla

Eftir málið til 2-0 tóktist Skála hava mist vónina, og talan var um einvegis ferðslu restina av hálvleikinum. Løtu eftir 2-0 málið hevði John Petersen enn ein gyltan møguleika eftir fríspæling frá Bárði Mortansson, men bólturin brast í tvørtræið. Í 37. minutti økti Jákup á Borg á offensiva miðvøllinum til 3-0 eftir innlegg úr høgru frá Bárði Mortansson enn einaferð, sum var ein áhaldandi hóttan allan fyrra hálveik. Sum heild fór álopsspælið hjá B36 nógv ígjøgnum høgru síðu.

Fjórða málið kom bert tríggjar minuttir eftir málið til 3-0, og var málskjúttin enn einaferð John Petersen. Jákup á Borg sendi horna úr vinstru, og John skallaði bóltin í netmeskarnar til 4-0, áðrenn farið var til hálvleiks.

### Julian Johnsson í góðum formi

Landsliðsleikarin Julian Johnsson, sum í fimm ár hevur verið fulltíðar yrkisleikari í Noregi og Onglandi, spældi sín fyrsta heimadyst í 1. deild í ár, og vísti hann góðar taktir í Gundadali. Beint áðrenn hálvleik skallaði hann á tvørtræið, og tá seinni hálvleikur var bert sjey minuttir gamal, skallaði Julian bóltin í málið eftir frálíkt innlegg úr vinstru frá Magna á Lakjuni. Hóast Julian á pappírinum aloftast spælir á defensiva miðvøllinum, hevur hann sera góð evnir at renna í djúpdina og harvið gerast málvandamikil, og tað vísti hann ferð eftir ferð sunnudagin.

Eftir fimta málið dovnaði dysturin, og ferðin var lág. Skála kom meiri við aftur í dystin, og spældu teir seg eisini fram til onkrar málmøguleikar, men eingin effektivitetur var at síggja í álopinum.

Magni á Lakjuni setti punktum á málveitsluna í 65. minutti, tá hann úr stuttari fjarstøðu hevði fylgt upp, eftir at málverjin hevði hálvbjargað frá John Petersen. Málmøguleikar vóru báðar vegir eftir sætta málið, men ferðin og intensiteturin var sjálvsagt farin úr dystinum. Fyri B36 høvdu bæði Julian Johnsson og John Petersen møguleikar at økja, meðan Marius Joensen hevði størsta málmøguleikan hjá Skála móti endanum av dystinum.

### Toppurin nærkast

Samanumtikið var talan um ein avgreiðsluspurning hjá B36, sum ikki lat mistakið frá fyrr í ár inni á Skála endurtakast. Nú er oddurin ikki eins fjarur og frammanundan, og tá HB tapti í Klaksvík, eru bert seks stig upp til oddaliðið HB.

Í løtuni sær ikki gott út hjá Skála, serliga ikki eftir frálíka javnleikin hjá TB á Toftum, men hóast alt eru ikki meiri enn trý stig millum bæði botnliðini, og tað skal bert ein dystur til at fáa javnvág í rokniskapin.

# FS Vágar dregur frá

**Í einum ikki serliga vælleiktum dysti leygardagin, vann FS Vágar tepurt á KÍ**

2.DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Sum landskappingin í 2.deild hjá monnum líður út, gert meira og meira greitt, at tað verður felagsliðið úr Vágoynni, ið skal spæla í fyrstu deild komandi ár. Meðan hini liðini í deildini hava torført at halda nakað støði, so hava vágamenn verið støðugir alt kappingarárið, og liggja langt fremstir í 2. deild

### Stóra leikliga yvirvág

Leygardagin høvdu vágamenn vitjan av klaksvíkingum, og heldur ikki KÍ megnaði at standa vágaliðnum kurl. FS Vágar høvdu greiða leikliga yvirvág allan dystin, meðan KÍ dúgaði uppá mótálop.

Dysturin var ikki serliga vælleiktur, og úr Vágum siga tey, at langt var ímillum málmøguleikarnir. FS Vágar hevði toført við at spæla seg ígjøgnum eina vælskipaði KÍ-verju, við jugoslavanum, Alexander Djordjevic, sum stýrimanni.

Alexander Djordjevic er júst heimafturkomin úr Jugoslavia, og hevur tí ikki vant tað stóra, og hetta var orsøkin til, at hann ikki var á besta liðnum hjá KÍ í vikuskiftinum.

Tað kom eisini bara eitt mál í dystinum, og tað fekk heimaliðið. Brasiliumaðurin, Silva, slapp ígjøgnum í vinstra bori, og legði bóltin fyri føturnar á John Johansen, sum við góðum skoti kundi leggja FS Vágar frammum 1-0.

Eftir málið dovnaði FS-Vágar nakað, og hetta gav klaksvíkingum nakrar málmøguleikar, sum kundu, við eitt sindur av hepni, givið mál. Gunnleivur Biskupstøð var nær við eini tvær reisur, men hann var ikki nóg kaldur frammanfyri FS-Vágar-málinum, og tí spurdist onki burturúr.

Við sigrinum er FS Vágar framvegis greitt oddalið í næstbestu deildini, og lítið røkist fyri, at nakar fer at hótta teimum uppflytingina. Hjá KÍ hevði ósigurin við sær, at teir liggja nú í miðjuni, og har er tað skjótt báðar vegir, tí frástøðan millum oddin og botnin í 2.deild er ikki stór.

**Dysturin í tølum:**
FS-Vágar-KÍ 1-0 (0-0)
1-0 John Johansen




## Formaður

Ísambandi við at formaður okkara, ígjøgnum mong ár, hevur vælt sær aðrar avbjóðingar, sóknast vit eftir formanni til framleiðslu okkara, at byrja 12. august, ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert maskinsnikkari, bygningssnikkari e.l.
- at tú hevur leiðaraevnir
- at tú ert ágrítin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar - Telefon 33 21 77 - Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo - Homepage: www.h-window.fo

*Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Felagini hava felags skrivstovu/avgreiðslu. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr timbur og plast. Í løtuni eru vit 23 starvsfólk, hvarav 8-10 eru í timburframleiðsluni.*

## Montørur

Vit sóknast eftir montøri at byrja 12. august ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- góða løn

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert timburmaður, snikkari e.l.
- at tú ert ágrítin
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

**Løn:**
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra** Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar - Telefon 33 21 77 - Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo - Homepage: www.h-window.fo

## Klinikkassistentur

Vit sóknast eftir útbúnum klinikkassistenti at byrja 01.09.02 ella skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er 40 tímar aðruhvørja viku.

Setanarviðurskifti eftir S&K-sáttmálanum.

Skrivlig umsókn við prógvi og evt. viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15.08.02.

**Tannlæknastovan við Hans Olaf Hansen**
Oman Eið 8
700 Klaksvík, tlf. 456039




## Hálvársroknskapur 2002

Í 1.000 kr.

| Rakstrarroknskapur | 2002 | 2001 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m | 148.201 | 157.359 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 52.042 | 66.921 |
| Rentuinntøkur netto | 96.159 | 90.438 |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 264 | 401 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur | 7.995 | 5.693 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir | 337 | 23 |
| Rentu- og ómaksgjøld netto | 104.081 | 96.509 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra | -4.216 | 500 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 2.762 | 2.796 |
| Úrslit av fíggjarpostum | 102.627 | 99.805 |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting | 59.091 | 51.055 |
| Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 4.056 | 5.720 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 378 | 484 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | 9.981 | 3.199 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 142 | -1.377 |
| Úrslit av vanligum rakstri | 29.263 | 37.970 |
| Skattur | 5.812 | 8.039 |
| Úrslit eftir skatt | 23.451 | 29.931 |

| Fíggjarstøða | | 2002 | 2001 |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | | 33.430 | 39.761 |
| Áogn í lánistovnum | | 354.609 | 350.960 |
| Útlán | | 3.540.565 | 3.160.450 |
| Lánsbrøv v.m. | | 712.923 | 674.775 |
| Partabrøv v.m. | | 93.041 | 69.522 |
| Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | | 19.729 | 7.524 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | | 1.134 | 858 |
| Óítøkiligar ognir | | 0 | 0 |
| Ítøkiligar ognir | | 136.089 | 131.889 |
| Onnur ogn | | 48.378 | 17.449 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | | 3.918 | 7.423 |
| Ogn tilsamans | | 4.943.816 | 4.460.611 |
| **Skuld** | | | |
| Skuld til lánistovnar | 1 | 16.086 | 134.949 |
| Innlán | | 3.902.688 | 3.494.293 |
| Onnur skuld | | 71.631 | 46.492 |
| Tíðarskeiðsavmarkingar | | 0 | 0 |
| Burturleggingar til útreiðslur | | 6.382 | 3.553 |
| Eginpeningur: | | | |
| Partapeningur og ábyrgdarfæ | | 663.799 | 11.028 |
| Grunnar | | 159.779 | 2.504 |
| Flutt frá undanfarnum árum | | 0 | 737.861 |
| At flyta frá ársins úrsliti | | 23.451 | 29.931 |
| Eginpeningur tilsamans | | 847.029 | 781.324 |
| Skuld tilsamans | | 4.943.816 | 4.460.611 |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan** | | | |
| Ábyrgdir | 1 | 10.802 | 81.825 |
| Aðrar skyldur | | 75.631 | 103.739 |
| Tøl, ið ikki eru tikin við í javnan tilsamans | | 186.433 | 185.564 |

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo